# Føroya Barnaheim søkir húsavørð

Søkt verður eftir húsavørði at byrja 1. oktober 2007 ella sum skjótast.

**Starvið umfatar:**
- Fast hálvtíðarstarv.
- Viðlíkahald bæði innan og uttan og annars alt fyrifallandi arbeiði.

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast efter einum fólki, ið
- Kann arbeiða sjálvstøðugt.
- Er handaligt.
- Er fyrikomandi.
- Hevur koyrikort.

Handverkarar hava fyrimun, men tað er einki krav.

**Lønarviðurskiftir:**
Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. august 2007 kl. 12.00. Merk umsóknina »Húsavørður«.

Ynskja tygum at hoyra meira um starvið, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara, á tlf. 31 23 20.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## KUNNGERÐ UM FRAMLØGU AV BYGGISAMTYKT FYRI FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar til byggisamtykt fyri Fuglafjarðar kommunu, verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 21.08.2007 til 01.10.2007 allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl 10 - 15.

Sambært uppskotinum verður partur av landbúnaðarøki, øki K, í bygdini Kambsdalur í Fuglafjarðar kommunu, umleið 10.000 m² broytt til sethús/bústaðarøki. øki B.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot til hetta, ið skulu verða skrivlig, mugu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 29. november 2007 kl. 16.00.

*Fuglafjørður 20. august 2007*
**Fuglafjarðar býráð**

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Skrivstovufólk
til Fiskiveiðieftirlitið

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Fiskiveiðieftirlitið, at byrja sum skjótast. Ert tú fyrikomandi og løtt/lættur at samstarva við, ert tú rætti persónurin til starvið.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Journalisering við DocuLive
- Innsláðing av dagbókadata
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH ella aðra líknandi relevanta útbúgving
- Góðan førleika, at samskifta á føroyskum og norðurlendskum.
- Góð samstarvsevni.

**Setanartreytir:**
Starvsheitið er »Skrivstovufólk«
Starvið er lønt í lønarflokki II sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fulltíðarstarv.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi, í seinasta lagi klokkan 14:00 hin 04. sep 2007.

**Fleiri upplýsingar:**
Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið á tlf. 31 10 65 og tosa við Lis H. Magnussen. Lýsingin er eisini at finna á heimasíðuni: www.fisk.fo

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Limafundur

fyri limir, ið starvast hjá tí almenna verður
**hósdagin 23. august 2007 kl. 16.00**
í hølum felagsins á Grønlandsvegi 58.
Talan er um hesi sáttmálaøkir:

- Almenn tænasta á landi
- Strandfaraskip landsins
- Magnus Heinason
- Fiskiveiðieftirlitið

Til viðgerðar vera komandi sáttmálasamráðingar.

**Maskinmeistarafelagið**

# Handilsbygningur til sølu

Handilsbygningur við Klaksvíksvegin 34 til sølu, um hóskansi boð fæst.

**Tlf. 456428 ella 220606**

TVØROYRAR KOMMUNA

# Starvsfólk til Dagstovnin Mýrifípan í Trongisvági

**Søkt verður eftir:**
**Einum pedagogi ella hjálparfólki** til barnagarðsstovu fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, starvið er 30 tímar um vikuna og verður í tíðarskeiðnum 9. septembur 2007 til 1. apríl 2008. Á stovuni ganga 20 børn í aldrinum 3 til 6 ár.

**Einum hjálparfólki** til Útibarnagarðin 30 tímar um vikuna at byrja skjótast møguligt eftir 1. septembur. Í Útibarnagarðinum ganga tey elstu børnini 5 til 7 ár; 20 børn.

**Einum pedagogi, ergoterapeuti,** ella ein við aðrari viðkomandi útbúgving til stuðulstoymið. Starvið er 30 tímar um vikuna. Í stuðulstoyminum starvast í løtuni ein pedagogur og ein fysioterapeutur.

**Vit vænta av tær m.a.:**
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- At tú hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnini
- At tær dámar væl at verða úti og dugir at læra børnini at fáa áhuga og virðing fyri náttúruni

**Til stuðulstoymið haravtrat:**
- At tú dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- At tú ert før/ur fyri at gera menningarætlan fyri hvørt barnið og arbeiða út frá tí
- At tú kanst samstarva við aðrar fakbólkar
- At tú dugir væl at orða teg munnliga og skriftliga

**Vit kunnu bjóða tær m.a.:**
- Eitt gott arbeiðspláss í støðugari menning
- At skapa og seta tín dám á gerandisdagin
- 20 góðar starvsfelagar
- Virðing og álit

**Stovnslýsing**
Dagstovnurin Mýrifípan er ein dagstovnur í Tvøroyrar Kommunu. Stovnurin er í 5 eindum, 1 vøggustova, 12 børn 0-3 ár, 2 barnagarðsstovur á 20 børn 3-6 ár, útibarnagarður 20 børn 5-7 ár og stuðulstoymið, ið arbeiðir fyri allan stovnin. Stuðulstoymið er viðgerandi, ráðgevandi og vegleiðandi fyri børn, starvsfólk og foreldur.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Guðrun Petersen, virkandi leiðara á tlf. 37 27 00.

**Løn**
Størvini verða lønt sambært sáttmála villum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ella avvarðandi fakfelag.

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða Dagstovninum Mýrifípuni, Smærugøta 8, FO 826 Trongisvágur í hendi innan 1. septembur.